# Kunngerð

## um broyting í kunngerð um arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi

**§ 1.** Í kunngerð um arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, dagfest 26. november 1999, verður hendan broyting gjørd í § 4, stk. 1:

ALS-gjaldið fyri hvørt ár hjá sjálvstøðugum vinnurekandi er 0,5 % av skattskyldugu inntøkuni sambært sjálvuppgávuni og skattaroknskapinum fyri síðst lokna roknskaparár. Afturat inntøkuni verða lagdar upphæddir, ið annars mugu metast at vera vunnar av vinnuvirkinum, og frátrektar verða upphæddir, ið mugu metast vera høvuðsvinnuni hjá virkinum óviðkomandi.

**§ 2.** Henda kunngerð fær gildi frá 1. januar 2003. Samstundis fer úr gildi kunngerð um broyting í kunngerð um arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, dagfest 21. mars 2001.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina 13. november 2002

Karin Kjølbro (sign.) formaður

Elisabeh O. Gaardbo (sign.)

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551 • als@als.fo • www.als.fo

# Kunngerð

## um útgjaldsdagar í 2003

Við heimild í § 16, stk. 4 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, við seinni broytingum, hevur stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina fyrisett:

**§ 1.** Fyri 2003 verður arbeiðsloysisstuðul útgoldin fyri í alt 252 dagar.
**Stk. 2.** Umframt leygar- og sunnudagar verður ikki útgoldið fyri hesar halgidagar:

- Nýggjársdag (1. jan.),
- Skírhósdag (17. apríl),
- Langafríggjadag (18. apríl),
- 2. páskadag (21. apríl),
- Dýra bíðidag (16. mai),
- Kristi himmalsferðardag (29. mai),
- 2. hvítusunnudag (9. juni),
- Jóladag (25. desember) og
- 2. jóladag (26. desember).

**§ 2.** Henda kunngerð fær gildi frá 1. januar 2003 og er galdandi fyri alt árið 2003.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina 12. desember 2002

Karin Kjølbro (sign.) formaður

Elisabeh O. Gaardbo (sign.)

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551 • als@als.fo • www.als.fo

# Musikkskúla-skipanin

Vegna broytt starvsbýti eru nakrir tímar leysir at søkja.

Søkt verður eftir lærarum at undirvísa í:

**Messingljóðføri**
2,5 tímar um vikuna í Leirvíkar Musikkskúla
4 tímar um vikuna í Nes Sóknar Musikkskúla

**Gittara**
3 tímar um vikuna í Klaksvíkar Tónlistarskúla

**Trummu**
1 tíma um vikuna í Suðuroyar Musikkskúla

Størvini eru tíðaravmarkað frá 15. januar 2003 til 31.juli 2003

Førleikakrøv: Prógv frá konservatorium ella aðra tónleikaútbúgving á sama stigi.
Setanar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Musikkskúla-lærarafelag.

Upplýsingar um størvini fáast hjá Martini Mouritsen, musikkskúlaleiðara

Umsókn, prógv og møgulig viðmæli skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 9. januar 2003

**Musikkskúlaskipanin**
Hoyvíksvegur 72
FO 100 Tórshavn
Tlf 316462 / 216462 Fax 316991
Teldupostur: martin@mmr.fo

# Kunngerð

**Frá Sørvágs kommunu**

**Um broyting av byggisamtykt v.m.**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um byggisamtykt og bygdaplan hevur kommunustýrið í Sørvági á fundi hin 28. november 2002 samtykt at broyta byggisamtyktina og bygdaplanin fyri Sørvágs Kommunu.

Broytingarnar eru galdandi fyri allar økispartarnar í kommununi.

Almenna byggisamtyktin saman við korti, tekningum og vegleiðing um kæru liggur frammi á kommunuskrivstovuni til almenna eftirskoðan í tíðarskeiðnum frá 2. januar til 1. februar 2003.

Mótmæli og broytingaruppskot skulu vera kommunustýrinum í hendi seinast 3 mánaðir eftir kunngerðardegnum.

Sørvágs Kommuna

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo



# Starvsfólk til nýggja pedagogiska verkætlan

Trivnaðarmálaráðið er, í samstarvi við viðgerðarstovnin Rókina, farin undir eina verkætlan, sum hevur til endamáls at geva 14-18 ára gomlum við skúla- og sosialum trupulleikum eitt pedagogiskt viðgerðar- tilboð.

Í hesum sambandi verður søkt eftir 2 starvsfólkum at arbeiða í miðal 40 tímar um vikuna. Størvini verða sett skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu. Tá talan í fyrsta umfari er um eina verkætlan, verða størvini sett fyribils í eitt ár.

Talan er um ein døgnstovn og eru arbeiðstíðirnar tí skiftandi - tvs. bæði dag, kvøld, nátt og vikuskifti.

Vit vænta at viðkomandi, ið sett verða, eru før fyri at arbeiða í sera tøttum samstarvi við bæði tey ungu og starvsfelagar og eru opin fyri nýggjum pedagogiskum avbjóðingum.

Tey, ið sett verða, skulu hava viðkomandi útbúgving/royndir og verða lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 13. januar 2003.

Meira fæst at vita við at venda sær til Súsan Johansen, fyristøðufólk á Rókini, á tlf. 318914.

**RÓKIN**
**Garðsgøta 31 - 160 Argir**

*Miðvágs-Sandavágs skúli*



# Lærari

Søkt verður eftir lærara til Miðvágs - Sandavágs skúla at byrja 27. januar 2003. Starvið er tíðaravmarkað hetta skúlaárið út.

**Tímatalva:**

10 t. í føroyskum, evning, tónleiki og kristni í 1. flokki
4 t. í enskum í 5. flokki
5 t. í føroyskum í 8. flokki
4 t. í týskum í 9. flokki

Starvið verður lønt sambært galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir saman við ljósriti av próvskjølum o.ø. skulu sendast skúlastýrinum í seinasta lagi 17. januar 2003.

**Miðvágs-Sandavágs skúlastýri**
V/Gitte Samuelsen
FO 360 Sandavágur

Sosialurin

Starv

# Handverkarar til verkstaðið




Til verkstaðið hjá Farmaleiðum, eru áhugaverd og mennandi størv sum mekanikarar leys at seta sum skjótast.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá verkstaðnum**
Høvuðsuppgávan hjá verkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna viðlíkahaldið av lastbilum, trukkum, lastum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni. Aðrar høvuðsuppgávur eru:

- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnaðinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bileftirlitið, verkstøð og aðrar myndugleikar

**Størvini fevna um**
Vanligt viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, trukkar, lastir o.a. útbúnað.

**Førleikakrøv**

- Mekaniska útbúgving
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Áhugaðir skulu senda umsóknina til:

***Strandfaraskip Landsins***
*Att. Starvsfólkadeildin*
*Boks 88*
*FO-110 Tórshavn*

Umsóknin skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 20. januar 2003.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Boga í Gil, verkførara, tel 343060 ella 213046. Teldupost: *big@ssl.fo*

Høvuðsuppgávan hjá fyri-tøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið

STRANDFARASKIP LANDSINS

34 30 30 - www.ssl.fo

REPROZ

# Gøtu bygdaráð

**hevur ásett føstu almennu fundirnar at verða niðan fyri lýstu mánakvøldið kl. 19.00 fyri**

**2003**

1. **27. januar**
2. **24. februar**
3. **31. mars**
4. **28. apríl**
5. **26. mai**
6. **23. juni**
7. **01. september**
8. **29. september**
9. **27. oktober**
10. **24. november**

Fundirnir verða hildnir í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni. Eykafundir ella broytingar til oman fyri nevndu verða lýstir í svørtutalvu við Gøtugjógv.

Gøtu Kommuna

# Landsfundur

Landsfundur Føroya Fiskimannafelags verður 30. desember kl. 10.00 í Norðurlandahúsinum.

Dagsskráin verður samb. viðtøkum felagsins. Umframt verður leiðarin í Skipaeftirlitinum, Óli Hans Hammer Olsen, gestarøðari.

Fiskimenn, sum hava útreiðslur av luttøku, fáa hesar endurgoldnar.

**Føroya Fiskimannafelag**

*Viðskiftafólki okkara kring landið ynskja vit eini gleðilig jól og eitt gott og eydnuberandi nýggjár við tøkk fyri gott samstarv í skjótt farna ári.*

***Kaj Andreasen & Co.***